











# Xenon lyktirnar gera nátt til dag

**Seinastu 75 árini hevur verið ein long menning av billyktunum frá teimum fyrstu veiku gløðiperunum til halogen-lyktirnar og víðari til nýggjastu xenon-lyktirnar. Drívmegin í allari hesari menning er ynski um tryggari náttarkoyring**




BILLYKTIR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggir bilar við xenon-forlyktum eru vorðnir alt meira vanligir seinastu árini. Vit leggja tað til merkis, tá vit møta bilum við sera sterkum ljósi í forlyktunum.

Xenon er ein slag av gassi, sum er í nýggju perunum. Í meðan ein vanlig halogen-pera nýtir 12 volt, brúka xenon-perurnar 23.000 volt, tá hon verður sett til. Hesi 23.000 voltini fáa ein neista at loypa millum tvær elektrodur inni í peruni, har sum xenon-gassið er. Síðan minkar spenningurin til 85 volt og ein ljósbogi rennur nú konstant millum elektrodurnar.

Fyrimunir við xenon-lyktunum er, at ljósið er meira hvítt enn á halogen-lyktunum og líkist meira dagsljósi. Xenon-perurnar hava nógv longri livitíð enn halogen-perurnar. Hetta tí tær hava ongan gløðitráð, sum kann slitna.

Xenon-perurnar halda umleið fimm ferðir so leingi sum vanligar halogen-perur. Halogen-perurnar kosta millum 60 og 100 krónur, í mun til Xenon-perurnar sum kosta umleið millum 1.100 og 1.500 krónur. Ljósstyrkin kann ikki samanlíknast, ein kanning hjá FDM vísir, at Xenon-perunar lýsa umleið 70 metrar longri fram á vegnum enn halogen-perurnar. Xenon-perurnar kunnu ikki eftirmonterast, tí forlyktirnar mugu vera sergjørdar til Xenon-perur.

Run Flat Tyre:

# Koyr víðari punkteraður

**Bilarnir verða alt tryggari, so hvørt sum nýggja tøknin mennist. Alt fleiri bilar fara at koma á marknaðin við RFT-dekkum, (Run Flat Tyre), sum eru gjørd til at kunna koyra eitt strekki upp á minst 80 kilometrar við 80 km/t uttan luft**

DEKK

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nógv verður gjørt fyri at gera bilarnar tryggari í ferðsluni, t.d. skulu bremsurnar ikki blokera, bilurin skal ikki spola og ikki glíða út í svingum.

Nú fáast eisini skipanir, sum ansa eftir lufttrýstinum í dekkunum (TPMS-skipanir) og afturat hesum er nú eisini komin Run Flat Tyre (RFT). Talan er um dekk, sum kunnu koyra og bera vektina av bilinum, hóast tey hava mist lufttrýstið.

RFT-dekkini eru uppbygd nakað annarleiðis enn vanlig dekk, t.d eru dekksíðurnar styrktar við gummi, sum kann bera vektina av bilinum, hóast øll luftin er likin út. Eisini eru dekkini gjørd soleiðis at tey halda sær á felgunum undir koyring uttan luft. Eftir at luftin er likin út, kunnu RFT-dekkini koyra eitt strekki upp á 80 kilometrar við 80 km/t.

Nýggir bilar, sum koma við RFT-dekkum, hava eina skipan sum ansar eftir lufttrýstinum í dekkunum. Hetta fyri at ávara bilføraran um t.d. at okkurt av dekkunum missir trýstið, so hann ikki koyrir við meira ferð enn 80 km/t.

Higartil hava tað mest verið dýrir sportsbilar og luksusbilar, sum hava RFT-dekk sum standard, men tey fara at blíva alt meira vanlig.

RFT-dekk eru umleið 15-20 prosent dýrari enn vanlig dekk.



*Nýggi BMW-1 hevur RFT-dekk sum standard*